# Vágamenn ætla at selja stórt og at keypa smátt

**Ætlanin er nú at selja línuskipið, West Freeezer, og at keypa eitt minni skip ístaðin**

ENDURNÝGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Eitt tað mest umrødda skipið í føroyska flotanum, West Freeezer, skal nú seljast, tí hann er ov dýrur í rakstri. Eigararnir ætla at útvega eitt minni skip ístaðin*

Línuskipið West Freezer í Miðvági skal nú seljast.

Tað er fyri at binda um heilan fingur, at West Freezer nú er til sølu.

West Freezer er eitt av Føroya mest umrøddu skipum, tá ið hann kom til Føroya í 1999.

Tað var, tá ið West Freezer kom, at kjakið um at flyta fiskiloyvi ímillum útróðrarflotan og línuflotan, kyknaði av álvara.

Men nú skipið hevur verið í føroyska flotanum í fýra ár, er ætlanin longu at selja hann aftur.

West Freezer er bygdur í Kanada í 1989 og kom til Noregs í 1995 og so aftur til Føroya í 1999.

Og tað er júst til Kanada, at ætlanin nú er at selja hann aftur.

Vit hava fingið upplýst, at eitt tilboð er komið úr Kanada upp á West Freezer. Og fyri nøkrum døgum síðani fekk Fiskimálaráðið eina umsókn frá felagnum, sum eigur West Freezer, um loyvi til at skifta skipið út.

Grundgevingin er, at West Freezer er ov dýrur í rakstri og nú teir ætla at selja skipið, er ætlanin at útvega eitt minni skip ístaðin.

Tá ið fiskiorkan skal roknast út, verður tað gjørt við at rokna longd x breidd x dýbd og úr fiskimálaráðnum verður upplýst, at skipið, sum ætlanin er at fáa inn ístaðin fyri West Freezer, er týðiliga minni.

Men tær nágreiniligu støddirnar høvdu teir ikki, tí tey, sum høvdu við tað at gera, vóru burturstødd.

### Ov dýrur í rakstri

Hóast tað hevur gingið rættiliga væl frá honum, skilst at eigararnir ætla at binda um heilan fingur, nú útlit eru fyri, at fiskaprísirnir fara at lække, tí West Freezer er ov dýrur í rakstri.

Tí ætla teir at utvega eitt minni skip ístaðin.

West Freezer fiskaði fyri 19 milliónir í fjør og beint nú hevur hann avreitt á Toftum fyri 900.000 krónur.

Reiðarin, Tummas Jacob á Løgmansbø, hevur ongar viðmerkingar.

Men í øllum førum skal hann ikki vænta at fáa innflutningsloyvi til nakað skip, fyrrenn nýtt landsstýrið er skipað.

Landsstýrið, sum nú situr, er bara ein starvsstjórn og hevur ikki heimild at taka nakrar sum helst avgerðir uttan tað, sum er neyðugt fyri at landskassin kann halda sínar skyldur og tær, sum eru neyðugar fyri at samfelagið kann haldast ígongd.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, hevur sostatt boðað reiðaranum frá, at umsóknin verður ikki tikin til viðgerðar, fyrrenn nýtt landsstýrið er skipað.

# Flutningsstuðul kann vera eitt bakkast fyri Suðuroynna

**Tað er ongin orsøk hjá flutningsfeløgunum at sigla kring landið eftir fiski, tá ið fiskavirkini fáa stuðul til at flyta fiskin til Havnar**

FLUTNINGSSTUÐUL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tá ið fiskavirki kring landið fáa stuðul til at flyta fisk til Havnar, er ongin orsøk hjá flutningsfeløgum at sigla krin landið eftir fiskinum*

Flutningsstuðul ella ikki?

Tað hevur verið ein spurningur, sum er nógv umrøddur í valstríðnum uppundir hetta løgtingsvalið.

Tað eru tey, sum hava ført fram, at skal fiskavirkjunum kring landið verða lív lagað, er tað neyðugt at tey fáa stuðul til at flyta fisk, bæði til virkini og tann virkaða fiskin av virkinum til avskipingarhavnina.

Serliga er hetta galdandi fyri Suðuroynna, sum liggur longst frá meginøkinum. Eitt vanligt sjónarmið hevur verið, at tað er neyðugt hjá Suðuroynni at hava beinleiðis samband til Skotlands fyri at kunna sleppa av við feskar vørur.

Tað eru nógv vinnulívsfólk, sum eru samd í hesum.

Men tað eru eisini tey vinnulívsfólk sum vísa á, at flutningsstuðulin eisini kann verða ein stórur vansi fyri tey ymsu økini í Føroyum.

Tey siga, at júst flutningsstuðulin er ein forðing fyri at sleppa av við feskar fiskavørur.

Tey vísa á tað, sum hendi, tá ið lógin um flutningsstuðul varð fyri í lóginginum í 1998.

Á tí fundinum ivaðust umboðini fyri Skipafelagnum í, um tað er rætt, at studningur nú møguliga verður latin til hendan flutningin. Ein spurningur hjá Skipafelagnum er, hví teir skulu fara út á plássini, um stuðul verður givin til hendan flutning.

Vinnulívsfólk siga, at tá ið virkini fáa stuðul til at flyta fiskin til avskipingarhavnina, verða vanligu marknaðarmekanismurnar settar úr gildi og sjálvsagt fara flutningsfeløgini ikki at brúka pening uppá at sigla oyggj úr oyggj eftir fiski, tá ið tað almenna betalir stuðul til at flyta fiskin til skipini ístaðin.

Skipafelagið siglur framvegis til nógvar bygdir kring landið, men summir túrar eru skerdir, eitt nú onkur av túrur í Suðuroynni beinleiðis á meginlandið, sum varð mettur at vera beinleiðis útflutningstúrur.

– Tað er dýrt at sigla bygd úr bygd og hví skulu vit sigla runt eftir fiski, tá ið virkini fáa stuðul til at flyta hann til Havnar, so at vit fáa hann til skipið, tí tað er nógv bíligari fyri okkum, spyr Skipafelagið framvegis.

Kortini sigur Skipafelagið, at flutningsstuðulin var ikki avgerandi fyri, at teir hava strikað onkran túr úr Suðuroynni beinleiðis niður á meginlandinum.

– Tann avgerðin varð tikin áðrenn flutningsstuðulin kom og grundin til avgerðina var, at nøgdirnar í Suðuroy vóru so smáar.

Annars heldur Skipafelagið ikki, at flutningsmøguleikarnir í Suðuroy er ikki heilt so ringir, ið summi vilja vera við.

Smyril sigldi á sinni beinleiðis úr Suðuroy fríggjakvøld. Vit sigla úr Havn fríggjakvøld, so bara Smyril er í Havn fríggjakvøld klokkan 18 ella klokkan 19, hevði fiskurin sloppið við, so tað er ikki tann heilt stóri munurin, sigur Skipafelagið.



POSITIVAR JAVNAÐARRØDDIR!



Nógvar uppgávur eru, sum skulu fáast frá hondini, áðrenn tann dagurin kemur, at støða skal takast til fullveldisspurningin. Vit hava brúkt óneyðuga nógva orku uppá at klandrast um henda spurning, og tann sum lurtar eftir valsríðnum hoyrir beinan vegin, at bæði sambandsflokkurin og tjóðveldisflokkurin trívast væl í hesari polariserin, tí tá kunnu teir vera vísir í, at einki hendir.

Vit hava snøgt sagt hvørki ráð ella tíð til allar hesar ósemjur longur. Og tí er neyðugt at Javnaðarflokkurin kemur at standa á odda fyri einari komandi samgongu, ið vil semjur heldur enn endaleysar ósemjur.

Politiskur stabilitetur, búskaparligur tryggleiki og tjóðskaparlig semja í sjálvstýrismálinum, eru tey mál sum standa ovast á mínari dagsskrá.

HELENA DAM Á NEYSTABØ

Eftir tann turbulens sum Føroya fólk hevur upplivað tey seinnu árini og serstakliga hesar seinastu mánaðirnar, er neyðugt við einum politikki, sum byggir á breiðar semjur.

Frá 1994-1998 forðaði Sambandsflokkurin øllum tosi um broytingar og menning í ríkisrættarligu støðu Føroya.
Frá 1998 til 2003 hevur Tjóðveldisflokkurin verið líka so avgjørdur í sama máli.

Henda gongd kann ikki halda fram.

Tí er brúk fyri einum sterkum javnaðarflokki nú, ið vil lurta og skapa semjur.

JAVNAÐARFLOKKURIN C

Eingi óverulig vallyfti

Tað, eg lovi veljaranum, er at fara í arbeiðsklæðini og at arbeiða við sama eldhuga, sum eg havi gjørt í fríu vinnuni í nærum 20 ár.

**Eg vil arbeiða fyri:**

- At vinnulívskarmarnir eru soleiðis, at so stór virðir sum møguligt verða skapt í hesum landi - vælferðini at frama.
- At íløgur verða gjørdar í at førleikamenna alt Føroya fólk.
- At stórar íløgur verða gjørdar í føroyska ungdómin, tí teirra vitan er okkara framtíð.
- At almenna umsitingin fær bestu arbeiðsumstøður, tí ein vælvirkandi almenn umsiting er fyritreytin fyri einum vælvirkandi nútíðarsamfelag.
- At mál, mentan og skúlaskapur fær høga raðfesting.
- At øll eru líka fyri lógini.
- At Føroyar gerast fullveldi.
- At Føroyar samstarva við allan heim.



E
TJÓÐVELDISFLOKKURIN
VEL FRAMTÍÐINA!

RÓI EGHOLM